# FREMMANDAMÁL Í FØROYUM

## Tilmæli til framtíðarætlan fyri fremmandamál í føroyska undirvísingarverkinum

8. JULI 2019

Lone Høeg Bejer, Annika Arnsteinsdóttir Nielsen, Hanus Iversen, Súsanna Debes Hammer, Annika við Skipá, Margreth Veihe og Maria Heradóttir

# Ætlan fyri fremmandamál í føroyska undirvísingarverkinum

**Mál lata hurðar upp.**

Tá ið vit læra fremmand mál, fáa vit møguleika at koma í samband við onnur fólk og aðrar mentanir. Hetta er við til at styrkja okkara fatan av, hvussu fólk liva og hugsa.

At duga fremmandamál er fortreyt fyri at taka lut í altjóða sambondum og gevur eina fjølbroyttari mynd av altjóða gongdum og hendingum. Í eini verð við øktum flytføri og talgildum sambondum eru fleirmálsligir og interkulturellir førleikar ein fortreyt fyri samskifti og virknum leikluti á nógvum økjum.

At læra mál snýr seg fyrst og fremst um at brúka málið – at lesa, lurta, tosa og skriva – í ymiskum høpi. Harumframt snýr tað seg um innlit í og samskifti um øðrvísi lívshættir, lívsáskoðanir, virði og mentanir. Hetta ber við sær størri tilvit um egnu mentan og nýggjar møguleikar fyri upplivingum. Høvið at uppliva og fáa innlit í mentanarlig viðurskifti er stimbrandi fyri persónligu menningina og dannilsið, samstundis sum tað letur dyr upp fyri fleiri møguleikum í útbúgving, arbeiðslívi og frítíð.

At læra fremmandamál byggir á royndir við øðrum málum bæði í og uttan fyri skúlan. Tá ið vit gerast tilvitað um strategiir fyri at læra fremmandamál, og hvørjar strategiir hjálpa okkum at skilja og sjálvi at verða skilt, gerst tað einfaldari og gevur meining at ogna sær kunnleika og førleikar. Umráðandi er at seta sær mál fyri læringina, hvussu vit best náa teimum og at eftirmeta egnu málførslu. At menna evnini til at læra fremmandamál gevur harumframt betri innlit í móðurmálið og er soleiðis ein týðandi liður í persónligu menningini. Førleikar í fremmandamálum skulu vera motiverandi fyri læring og geva vaksandi innlit í enn fleiri mál og mentanir. Hesir førleikar styrkja fleirmæli og leggja eitt týðandi grundarlag fyri lívlangari læring.

**Føroyar í alheimssamfelagnum**

Við alheimsgerðini verða lond knýtt alsamt tættari saman. Tí hevur tað ongantíð verið meir átrokandi enn nú at læra fremmandamál fyri at liva og virka í nú- og framtíðarsamfelagnum. Tørvurin á at samskifta og samstarva tvørtur um mál og mentanarmørk er støðugt vaksandi. Fyri eina smátjóð sum Føroyar, sum eru serstakliga bundnar at umheiminum, er tað ikki minni umráðandi at tryggja sær hollan kunnleika í fleiri fremmandamálum sum fortreyt fyri framhaldandi kappingarføri og menning.

**At fóta sær í støðugt broytiligum tíðum**

Í meldrinum av eini støðugt broytiligari verð, har alskyns rák floyma inn yvir okkum, og virði og fordómar bresta saman, er tað umráðandi, at vit sum menniskju og tjóð megna at hóra undan og varðveita kjølfestið í egnum máli og mentan - í egnum samleika bæði sum einstaklingar og tjóð. At læra mál ger okkum før fyri at skilja aðrar mentanir innanífrá, sum málið sjálvt er lykilin til. Tað ger okkum meir opin og tolsom, sum er ein týðandi liður í arbeiðinum at tryggja heimsfrið og fólkaræði. At læra mál gevur okkum eisini møguleika at spegla okkum og síggja okkum sjálv úr aðrari frásjón. Hetta er við til at varpa ljós á okkara egna og sermerkta, ið gerst sjónligt í ljósinum av tí fremmanda. Harumframt er tað við til at varpa ljós á møguleikar at læra av øðrum, at gerast ríkari og harvið at menna seg víðari. At læra fremmandamál og fáa innlit í aðrar mentanir er sostatt ein førleiki, ið er við til at styrkja og menna okkara samleika sum einstaklingar, føroyingar, alheimsborgarar og sum tjóð í tí støðugt broytiliga, ið eru grundleggjandi lívskor í dag.

**Enskt og grannamálini**

Danskt og enskt eru bæði mál, sum longu eru partur av gerandisdegnum hjá børnum og ungum í Føroyum í dag. Danskt er okkara portur til norðurlendska mentan og máløkið, og hollur kunnleiki í norðurlendskum máli er alneyðugur, fyri at vit framhaldandi kunnu tryggja okkum javnbjóðis atgongd til norðurlendskan mentanararv, útbúgving og arbeiði í

norðurlondum. Enskt er hinvegin málið, sum nógv børn og ung í ovurstóran mun lesa, hoyra og samskifta á, tá ið tey sita við skíggjum upp í fleiri tímar dagliga.

Tilgongdin til at læra danskt og enskt er sostatt nógv øðrvísi enn at læra eitt nú týskt, av tí at næmingar eru vanir við at hoyra tey fyrru málini í gerandisdegnum. Týskt sum fremmandamál hoyrir tískil heima í einum øðrum bólki fyri seg.

## Enskt og fremmandamálini

Enskt er eitt sera týdningarmikið mál at duga í dag, og við tí koma vit eisini langt.

Ígjøgnum enskt hava vit atgongd til ómetaliga ríku og fjøltáttaðu mentanirnar í enskmælta heiminum. Enskt er eisini eitt útbreitt arbeiðsmál á fleiri økjum. Tað er tí einki minni enn eitt bragd at eiga eitt felags alheimsmál, sum alsamt fleiri duga.

Vit kunnu tí av røttum spyrja, um ikki tað er nóg mikið við einum fremmandamáli, ið røkkur so langt, sum enskt ger. Tað tykist vera vanligur hugburður, at duga vit nóg væl enskt, er ikki tørvur á at læra onnur fremmandamál. Jú eyðvitað hevur enska málið vunnið sær tign sum altjóða samskiftismál og sæst hesin hugburður eisini týðiliga aftur í teimum broytingum viðvíkjandi fremmandamálum, sum komu við nýggju breytaskipanini í 2013. Hetta er tó ein misskiltur og óheppin málpolitikkur.

Duga vit eitt fremmandamál, fáa vit innlit í eina fremmanda mentan, t.v.s. ein øðrvísi hugsanarhátt, onnur virði, fremmandar skipanir og harvið aðrar veruleikar. Vit læra at síggja við øðrum eygum og at skilja aðrar mentanir innanífrá. Hetta gevur stórar møguleikar fyri at mennast sum menniskja, sum føroyingur og sum heimsborgari og kann eisini gerast spírin til nýggjar óendaligar møguleikar, sum bara bíða eftir at verða sæddir.

Eftir russiskt, er týskt nógv størsta móðurmálið í Evropa, framman fyri franskt, enskt, italskt og so spanskt. Evropisku tjóðirnar eru ikki altíð eins fúsar, og vit halda, til at samskifta á enskum – tær hava sjálvar ein sterkan málsligan samleika. Virða vit hann, fer tað at geva okkum stórar fyrimunir í sambandinum við hesar tjóðir.

Hóast enskt í stóran mun er málið, sum vit kunnu detta afturá, tá ið onnur mál ikki røkka, kann samskifti á triðja máli ongantíð gerast eins effektivt og beinleiðis samskifti, m.a. vegna vantandi innlit í samfelag og mentan í viðkomandi landi. Førleikin at samskifta beinleiðis

kann ikki undirmetast. Hava vit henda førleikan, fer hann at geva okkum fyrimunir sum smátjóð í kappingini við aðrar stórar tjóðir, ið ikki raðfesta hesar førleikar. Hetta ger seg galdandi m.a. í samskifti um gransking, útbúgving og samhandil.

At enskt hevur sætað sær fremst millum øll heimsins mál, ger, at vit fáa størri og størri tørv á bæði eini málsligari eins og eini mentanarligari mótvekt. Enskt hevur lagt seg sum eitt filtur, vit hyggja ígjøgnum og spegla okkum í. Vit halda, at soleiðis sær verðin út, og soleiðis síggja vit út í mun til útheimin, men veruleikin er nógv fjølbroyttari enn so. Tað kann eisini hugsast, at serliga smátjóðir sum okkara við egnum máli eru mest útsettar fyri hesi einsrætting, tí okkara egna mál fyllir ikki líka nógv í almenna rúminum sum t.d. onnur heimsmál gera í sínum heimlandi. Hetta er enn ein orsøk til at læra onnur fremmandamál heldur enn bara enskt.

Í hugaheiminum hjá mongum stendur føroyskt rættiliga einsamalt sum bendingarmál, tí fleiri duga bara danskt og enskt afturat móðurmálinum. Hava vit trupult við føroyskum, elvir hetta lættliga til ta fatan, at føroyskt er torført og ótíðarhóskandi. Hetta sæst m.a. aftur í illviljanum móti egnum máli, sum er rættiliga útbreiddur hjá summum. Fyri føroyskt er týskt tí ein hóskandi málslig mótvekt móti bæði donskum og enskum, sum bæði í nógv størri mun eru fyrisetingarmál. At læra enn eitt bendingarmál og við sama uppruna sum føroyskt er við til at seta móðurmálið í frásjón. Tað gevur næmingum eina nýggja tilgongd til føroyskt sum síðuvinning, umframt at teir eisini læra týskt. Soleiðis verða bæði málini styrkt í eini synergieffekt.

Franskt og spanskt eru bæði mál, sum verða tosað um allan heim. Harafturat er spanskt mest útbreidda móðurmál í heiminum eftir mandarin. Bæði málini geva atgongd til ríkar og fjølbroyttar mentanir og tæna okkum tí væl – eisini sum mentanarlig mótvekt. At fáa betri javnvág í okkara fatan av heiminum kann samstundis stuðla upp undir, at vit ikki fyrilitarleyst taka ávirkanina úr ensktmælta heiminum til okkara.

**Føroyar og útheimurin**

Góðir málsligir førleikar hava leingi verið ein styrki hjá føroyskum lesandi, tá ið tey eru farin út í heim at nema sær útbúgving og hjá føroyingum í arbeiðsørindum uttanlands. Við nýggju breytaskipanini á miðnámi sæst týðiliga, at vit eru um at missa hesar førleikar. Breyta-

skipanin leggur minni áherðslu á fremmandamálini, og politiski myndugleikin signalerar harvið, at fremmandamál ikki verða mett at hava týdning. Longu nú síggja vit týðiliga, at førleikarnir í fremmandamáli millum okkara børn og ungu eru dalandi. Samstundis er málsligi førningurin yvirhøvur vorðin skroypiligari - eisini í føroyskum og donskum. Hendan gongdin er ørkymlandi.

Vilja vit framhaldandi røkja samskiftið við umheimin, er alneyðugt hjá okkum støðugt at útbúgva fólk við málførleika bæði á høgum stigi og lægri stigi. Sendifólk og samráðingarfólk við hollum málkunnleika tryggja okkum bestu úrslit í vinnu- og handilssambondum úteftir.

**Ferðavinnan**

Ferðavinnan í Føroyum er í sera stórum vøkstri, og tí er alneyðugt, at vit sum samfelag brynja okkum til hesa avbjóðing. Fokus er longu á, hvussu vit verja viðbreknu náttúruna, og hvussu vit best skipa fíggjarliga partin av hesum. Ein annar stórur spurningur, sum ikki fær sama uppmerksemi, er, hvussu vit fakliga menna okkum til at taka ímóti ferðafólki í túsundatali árliga. Her eru førleikar í fremmandamálum ein avgerandi partur av teirri tænastu, sum vit eiga at kunna bjóða ferðafólki. Sostatt er ein vaksandi tørvur á fólki, ið dugir fremmandamál – eisini onnur mál enn enskt. Hetta er ein sjálvsøgd tænasta, sum ferðafólk halda høgt í metum.

Ferðaleiðaraskeið verða skipað á miðnámsskúlanum í Vestmanna, har upptøkukrav er hollur førleiki í einum ella fleiri fremmandamálum í minsta lagi á B-stigi. Fremmandamál er tó ikki ein partur av undirvísingini men ein fortreyt. Verður málundirvísingin á miðnámi tí ikki styrkt, kann hetta upptøkukrav gerast ein forðing hjá áhugaðum umsøkjarum.

Ferðaleiðarar og móttøkufólk, ið megna vanligt prát á fremmandamálum, tryggja ferðafólki eina góða og trygga uppliving í Føroyum. Fólk í okkara samskiftisfyritøkum við hollum kunnleika til mál og mentan í øðrum londum kunnu seta Føroyar enn meira á heimskortið. Øll hesi fólk koma allari skjótt vaksandi ferðavinnuni til gagns.

**Týskt í fólkaskúlanum**

Heilin mennist av at læra fremmandamál, og tí er tað stórt spell, at partur av ungu heilunum sleppur at liggja óvirkin. At læra eitt fremmandamál gevur næminginum førleikan at læra enn fleiri fremmandamál. Tað er onki mark fyri, hvussu nógv mál vit kunnu læra. Gransking vísir, at fyri hvørt nýtt fremmandamál vit læra, gerst tað lættari at fara undir uppaftur eitt. Tað at læra onnur mál tekur heldur onki frá móðurmálinum, tvørturímóti hevur tað víst seg at vera ein styrki fyri móðurmálið at duga onnur mál.

Næmingarnir í fólkaskúlanum læra danskt frá 3. flokki og enskt frá 4. flokki. Tað er óheppið, at ov long tíð gongur, til teir læra næsta fremmandamál ella einki nýtt mál læra yvirhøvur eftir 4. flokk. Hóskandi hevði verið at lært eitt nýtt fremmandamál í 6. ella 7. flokki fyri at halda førleikan at ogna sær mál við líka. Harumframt hava næmingarnir í hesum aldri eitt íborið forvitni og ein opinleika, sum eigur at verða gagnnýttur, tá ið hugsað verður um læring.

Triðja málið í fólkaskúlanum eftir føroyskt eigur at vera týskt. Føroyskt og týskt hava sama uppruna og líkjast nógv. Tey eru bæði bendingamál, og týska málløran líkist sostatt nógv tí føroysku. Næmingar læra við øðrum orðum týskt, samstundis sum teir verða styrktir í sínum egna móðurmáli, (væl at merkja um tað er føroyskt). Lærugreinin er soleiðis við til at styrkja føroyskt og málfatan í heila tikið, sum er ein av orsøkunum til, at týskt skal vera næsta fremmandamálið eftir enskt í fólkaskúlanum. Aðrar orsakir eru útbreiðslan av týska málinum í okkara heimsparti, at Týskland er búskaparliga fjórðsterkasta tjóð heimsins og tí lokkandi fyri alt samstarv, og tí mentanin er rík og í stóran mun eisini felags við okkara.

Mælt verður til at byrja við einum ella tveimum tímum um vikuna, og at allir næmingar hava týskt. Eftir hetta kunnu teir velja, um teir halda fram við týskum í 8. og 9. flokki. Til samanberingar kann nevnast, at í Danmark byrjar undirvísingin í týskum í 5. flokki, og í fleiri skúlum longu í 1. ella 2. flokki.

Týskt er harumframt ein góð barlast fyri næmingar, sum læra fremmandamál á miðnámi. Royndir vísa, at næmingar ofta ikki hava nóg góðan málsligan førning við sær, um teir ikki eisini hava havt týskt í fólkaskúlanum. Hetta sæst týðiliga aftur í fráfallinum í fremmandamálslærugreinum á miðnámi, sum er sera óheppið fyri teir næmingar, sum á hálvari leið í skúlagongdini varnast, at teir hava valt skeivt. Eisini vísa royndir, at næmingar, sum hava neyðuga málsliga førningin við sær, klára seg betur í øllum fremmandamálum á miðnámi. Týskt í fólkaskúlanum er sostatt við til at lyfta stigið í fremmandamálunum sum heild á miðnámi og gevur ein yvirskipaðan málsligan førleika, sum eisini er neyðugur, um

næmingarnir skulu fóta sær so mikið, at teir megna at brúka serliga eitt byrjanarmál sjálvstøðugt eftir lokið miðnám.

**Fremmandamál á miðnámi**

Tað er av stórum týdningi, at vit byggja brýr millum fólkaskúlan, miðnám og hægri útbúgvingar, til tess at góðir lunnar kunnu leggjast undir undirvísing, eitt nú í fremmandamáli, so tíðliga sum gjørligt, og fyri at skapa ein kontinuitet, sum tryggjar næmingum smidligt og trygt framhald, so hvørt sum teir ferðast upp gjøgnum skúlaskipanina.

Tað skal vera krav, at næmingar hava prógv í týskum í fólkaskúlanum fyri at sleppa inn á hugbreyt og búskaparbreyt, har fremmandamál hava sín eyðsædda leiklut. Hetta merkir ikki, at týskt er tvungin lærugrein á hesum breytum, men at næmingar kunnu velja týskt, spanskt, franskt (og latín?).

Málførleikar eru sera viðkomandi fyri næmingar á búskaparbreyt, ið skulu brúka sína útbúgving innan samhandil millum lond í eini alsamt vaksandi alheimsgerð. Málførleikar eru eisini ein sjálvsagdur partur á hugbreyt, har kjarnin er kunnleiki til onnur mál og humanistisk fak í heila tikið. Afturat hesum fer vaksandi ferðafólkahópurin, ið árliga vitjar oyggjarnar, at fáa eina nógv ríkari uppliving, um vit hava væl útbúgvið fólk, ið dugir annað enn danskt og enskt.

Týskt er ikki upptøkukrav á hugbreyt, og tí eru upptøkukrøvini ikki eins høg og tey á náttúrubreyt, har prógv í alis- og evnafrøði frá fólkaskúlanum er kravt. Avleiðingin er, at teir bókliga veiku næmingarnir tískil velja hugbreyt. Hetta er við til at lækka støðið á hugbreyt yvirhøvur, soleiðis at teir dugnaligu næmingarnir ikki fáa møguleika at menna sínar førleikar á fullgóðan hátt. Hetta merkir hinvegin eisini, at nógvir ofta dugnaligir næmingar, ið annars hava hug og hegni til fremmandamál, enda á náttúrubreyt, har møguleikarnir fyri at velja fremmandamál ikki eru nøktandi í verandi støðu.

Fyri at tryggja javna upptøku á øllum breytum hevði verið hóskandi, um sama krav um týsktkunnleika eisini varð settur teimum, ið søkja inn á fyrireikingarbreyt. Hetta er ein breið miðnámsútbúgving, har næmingarnir hava brúk fyri førleikum á fleiri økjum.

**Hvørji fremmandamál**

Sum land hava Føroyar tørv á, at vit duga fleiri mál. Jú fjølbroyttari samansetingin er, jú fleiri gerast møguleikarnir og fyrimunirnir. Kortini mæla vit til at útboðið av fremmandamálum á miðnámi í fyrsta umfarið verður avmarkað til týskt, spanskt, franskt og latín.

Í fyrsta lagi eru hesi málini skyld við føroyskt, enskt og danskt. Tí er tað natúrligt at byrja her, áðrenn byrjað verður við málum, sum eru munandi meiri fremmand.

Í øðrum lagi hava vit valla næmingagrundarlag fyri fleiri fremmandamálum, sum nú er, og vit missa meir enn vit vinna, um avleiðingin er, at færri hold í fremmandamálum verða stovnað vegna ov lítla undirtøku. Hetta er longu galdandi við týskum byrjanarmáli og framhaldsmáli, har grundarlag í praksis so dánt er fyri framhaldi, meðan tey, ið mugu velja byrjanarmál, í veruleikanum ikki fáa møguleikan at velja týskt.

Seinnu árini hava vit sæð eina vaksandi ójavnvág millum málini, samstundis sum øll málini eisini hava verið í minking. Her má vend koma í, soleiðis at fleiri aftur velja mál, og býtið gerst javnari. Tí er umráðandi, at næmingarnir eisini fáa holla kunning um fremmandamálini, sum í breytaskipanini eru javntstillað sum valfak.

Vinna broytingarnar frama viðvíkjandi fremmandamálum, sum eru okkara tilmæli, verður munandi lættari at velja mál.

**Byrjanarmál og framhaldsmál**

Vit eiga at at javnseta framhaldsmál B við byrjanarmál A á tann hátt, at næmingar, ið skulu velja eitt fremmandamál A, tá teir byrja á miðnámi, ístaðin kunnu velja eitt framhaldsmál B. (Hetta er, sum er, bara møguligt í týskum). Hægri lærustovnar javnseta nevnliga byrjanarmál og framhaldsmál B í upptøkukrøvunum. Hetta er ein fyrimunur, sum næmingar í Danmark hava, og sum okkara næmingar eisini eiga at fáa. Harvið fáa næmingar møguleika at læra týskt væl, sum samstundis gevur atgongd til hægri lestur, sjálvt um teir ikki velja eitt fremmandamál á A-stigi. Í onkrum føri merkir tað so, at teir velja aðra lærugrein upp á A-stig enn eitt fremmandamál. Men hetta hevði gjørt, at teir næmingar, sum velja týskt í fólkaskúlanum, fáa ein ágóða, samstundis sum tað er ein fyrimunur fyri hesar næmingar á miðnámi, tí teir fáa størri frælsi at velja lærugreinir á 3. ári. Teir kunnu sjálvsagt eisini velja

at halda fram við týskum eftir 2 ár og velja týskt framhald A. (Røddir eru frammi, sum meina, at á sama hátt átti eisini at verið møguligt at enda enskt á B-stigi, sum somuleiðis gevur atgongd til hægri lestur, við møguleika at velja tað upp á A-stig).

Hetta ger, at tær breytir, har fremmandamál er eitt krav, verða meira fleksiblar og harvið meira attraktivar, samstundis sum tað vónandi eisini fer at skapa eina betri javnvág ímillum fremmandamálini.

**Stutt samanumtøka**

Við støði í tí, ið er viðgjørt omanfyri, hava vit hesi ítøkiligu uppskot um broytingar:

- Týskt verður kravd lærugrein í 6./7. flokki fyri øll – ein/tveir tímar um vikuna og vallærugrein frá 8. flokki.
- Tvey/trý ár týskt verður upptøkukrav á hug-, fyrireikingar- og búskaparbreyt.
- Á hugbreyt verða tvey fremmandamál vald: franskt, spanskt, týskt, latín, annað á A-stigi og hitt á B-stigi.
- Á búskaparbreyt verður eitt fremmandamál valt á B-stigi: franskt, spanskt, týskt, latín
- Á øllum breytum verður tryggjað, at møguleiki er fyri at velja fremmandamál upp á A-stig.
- Á øllum breytum byrjar skúlaárið við (innleiðslu)skeiði í almennari málfatan.
- Krav skal verða at hava eitt fremmandamál á B-stigi á fyrireikingarbreyt.
- Avvarðandi skúlamyndugleikar mugu krevja av skúlaleiðslum, at teir kunna um og raðfesta málfakini við atliti at tímatalvu, málferðum og øðrum viðkomandi tiltøkum.

**Hvussu styrkja vit fremmandamálini**

Fremmandamál kunnu styrkjast á ymiskan hátt. Eitt er at gera tað meiri freistandi at velja mál og at arbeiða við máli. Eitt annað er at hække góðskuna í undirvísingini við m.a undirvísingartilfari til føroyska málbólkin í øllum fremmandamálum, hægri raðfesting í vikuætlanini og afturvendandi eftirútbúgving av lærarum.

Eitt, sum kann vera við til at gera tað meiri freistandi at velja mál, er, at skúlar hvørt ár skipa fyri málferðum fyri næmingar, sum taka spanskt, týskt ella franskt á A-stigi. Samstundis sum at hetta kann virka sum ein gularót, so er tað sjálvsagt eisini gott og motiverandi at læra mál uttan fyri skúlastovuna. Skúlarnir eiga tí eisini at hava eitt skipað samstarv við skúlar í øðrum londum.

Eitt annað er, at lærarar og skúlar í nógv størri mun hugsa um samstarv millum holdini í sama máli og samstarv millum mállærugreinarnar sum heild. Tað kann t.d. vera at hava ein evnisdag, har øll, sum hava eitt mál, arbeiða saman um eitt felags evni.

Eisini er hugburðurin til mál á skúlunum, serliga í leiðsluni, týdningarmikil. At uppliva mál sum ein møguleika, sum kann brúkast, motiverar næmingar. Altavgerandi er tí, at næmingar fáa hesa fatan og ikki bara uppliva mál sum eitt krav uttan meining.

Undirvísingin í fremmandamálum eigur at fara fram í stamflokkum. Tryggir karmar skapa betri arbeiðsumhvørvi - bæði fyri at læra mál og fyri samstarvi millum lærugreinar.

Undirvísingin í fremmandamálum eiga at liggja spjødd yvir vikuna, ikki bara í blokkum men eisini í hálvum blokkum. Orsøkin er, at tað hevur stóran týdning at hoyra málið regluliga og má hetta tí verða hugsað inn í skemaleggingina.

**Í arbeiðsbólkinum, ið skrivað hevur, sótu:**

Lone Høeg Bejer, Annika Arnsteinsdóttir Nielsen, Hanus Iversen, Súsanna Debes Hammer, Annika við Skipá, Margreth Veihe og Maria Heradóttir

Juli 2019